# Tann drúgva ferðin



„Fram „ inni í Hvalvíkini, ein kópur liggur skotin á ísinum og likkur hyggja at.

*Eftir Jústinus Leidsson Eidesgaard*

„Fram“ stevndi suður í Atlantshav, eftir at akkerið varð hálað á Madeira. Skipið var serbygt til at standa seg móti øllum vandunum í ísinum og var ikki serliga væl egnað, nú teir nærkaðust Ekvator og tað gjørdist heitari og heitari. Hundarnir vóru um alt skipið og tað gjørdist óterrligt sum hitin vaks. Ikki tí skipaði viðurskiftir vóru umborð og hvønn einasta dag varð dekkið spulað tvær reisiur og reint vard gjørt eftir hund-unum.

Lagið var gott umborð, nú allir vistu hvar teir stevndu og teir vóru hugaðir at vinna kappingina um Suðurpólin. Um sama mundi var bretski kanningarfarin Robert F. Scott á veg til Australiu og hann hevði somu ørindi um Amundsen, hann ætlaði sær á Suðurpólin. Scott visti ikki enn, at Amundsen stevndi móti Suðurpólinum. Hann fekk ikki boðini, fyrr enn hann kom til Melbourne í Ausraliu.

Kendi Amundsen serfrøðingurin, bretin Roland Huntford ger nógv burturúr í bók síni um Amundsen og Scott, at samanbera hesar menn, Tað fer at taka ov langa tíð her at greiða hesar samanberingar út í æsir. Men vit nerta við tær av og á.

Huntfor skrivar millum annað um tá bæði skipini „Terra Nova“ og „Fram“ tá tey stevndu suðureftir: „Leiðslan hjá Scott speglast í dagbókunum umborð á „Terra Nova“ Tú kennir støðuloysi, onki mál fyri framman og einki bjartskygni. Umborð á „Fram“ er lagið ørvísi, her er vilji og Amundsen kagaði so langt fram í tíðina, at gamli felagin hjá Nansen, Johansen skrivaði í dagbókini: „Nógv sum eigur at vera gjørt umborð á einum skipi, sum skal verða gjørt, liggur á láni, eitt nú at halda seglini verður roknað sum hjáputl.“

Tríggjar dagar eftir at „Fram“ var farið úr Madeira skrivað Amundsen í dagbókina: „Vit eru nú byrjaðir at fyrireika okkum til Suðurpólsferðina. Segl-makarin Røne, seymar gólv í 16 mannsteltini og Bjaaland er farin at bøta um sleturnar.“

Umborð á „Terru Novu“ skrivar Cherry-Garrard um saman mundi, tann 7. august 1910. „Ewans, Campell og Wilson hava sett eina sletunevnd og sett meg sum skrivara, tó tað verður ikki tað nógva eg skal gera..

Hetta er skrivað næstan eitt heilt ár aftaná at Scott gav boð um, at hann ætlaði sær á Suðurpólin. Fyrireikingarnar hjá bretum vóru ikki byrjaðar enn, meðan hvør maður umborð á „Fram“ hevði úr at gera at fyrireika Suðurpólsferðina.

Amundsen var ógvuliga upptikin av at bøta um útgerðina, hvør minuttur á tí fýra mánaða langa túrinum av Madeira og suður í Hvalvíkina varð nýttur til hetta endamál. Vanligt var í gomlum døgum umborð á skipi, at dagurin var hátíðarhildin, tá eitt skip passeraði linjuna ella ekvator. Men slíkar hendingar fingu ikki loyvi at broyta arbeiðslagið umborð.. Dagurin var hildin sunnudagin 2. oktober 1910 og Amundsen kallaði hann í síni dagbók: „ okkara ekvatordøgurði, hóast við vóru eini tvey stig norðanfyri. Vit hava ikki stundir at nýta ein gerandisdag til slíkt fjas.“

Hundarnir fyltu nógv í gerandisdegnum og teir settu rættuliga lív í á hesi longu ferð gjøgnum havoyðuna, har einki annað var at stytta sær stundir við enn arbeiðið. Hundarnir fylla meira í dagbókunum enn skipsfelagarnir. Hvør maður hevði nakrar hundar, sum hann skuldi ansa eftir. Johansen skrivar í dagbókini: „Mínir hundar eita „Líkið“, hann er helst tann elsti umborð og hevur í sínum fyrra livi helst verið ein øgiligur tyranum, men nú er hann slakkaður nakað. Og so havi eg „Skalpen“ og „Alfons“, ernir hundar, sum halda saman í øllum.“

Amundsen skrivar í dagbókini: „Fyri at ambæta okkara børnum, so máttu vit fara skipaðir til verka. „ Í fyrstuni vóru teir bundnir, fyri at ansa eftir at teir ikki drupu hvønn annan, tá teir brustu saman og bardagi var tað besta teir vistu.. Teir máttu tveita matin fyri teir, so smædnir og bítskir vóru teir. Men hetta broyttist skjótt og tvær vikur seinni skrivar Amundsen:

„Á tann gangur, tá vit geva teimum at eta. Tað er rørandi hvussu góðir hundarnir gerast við teir sum geva teimum at eta.“



Hundarnir vóru um alt skipið og skaptu trivna





Teir veiða kóp á rekaísinum

Fyrst í oktober kendust hundar og menn so væl, at at teir vágaðu at sleppa teimum leysum við munnkurv. Allir hundarnir brustu saman beinanvegin, men ongin fekk skaða, bert onkur lagdur lá á dekkinum . Teir bardu illsinnið úr sær. Og Amundsen heldur fram:

„Áðrenn vit loystu hundarnar, høvdu vit lagt merki til, at nakrir av eini ella aðrari orsøk ikki trivust sum teir skuldu. Teir vóru smædnir og óróligari enn hinir. Tann dagin vit loystu teir sóu vit hvat var áfatt. Onkur av teirra vinum var bundin onkra aðrastaðni á dekkinum og at teir ikki kundu vera saman var orsøkin til vánaliga hýri. Tað var rørandi at síggja hvussu fegnir teir vóru, tá teir sóust aftur. Sjálvandi settu vit so teir sum vóru væl saman og teir skuldu eisini vera saman á pólinum frammanfyri sleturnar.“

## Ísur í eygsjón

Tað gekk skjótt framá hjá „Fram“, tann annan januar 1911 fóru teir suður um sunnara pólkringin og teir funnu opið hav sunnari enn nakar annar á teimum átta kanningarferðunum, sum feamman undan vóru gjørdar til meginlandið á Suðurpólinum. Men kanska var tað ikki bert eydna, tí umborð á „Fram“ vóru íslosar, sum høvdu drúgvar royndir í ísi og teir høvdu væl og virðiliga kannað keldutilfarið, sum fannst um ísin á sunnaru hálvu og gjørt sínar niðurstøður. Teir vistu, at ísurin fylgdi eini ávísari leið. Einastaðni var belti av rekaísinum smalast og har skuldu teir royna at sigla igjøgnum. Innanfyri rekaísiní Ross havinum var opin sjógvur heilt inn at landi.. Teir høvdu roknað seg fram til, at ísbeltið var tynnst beint vestanfyri 180 stig . Íslosurin Beck frá Tromsø í Norðurnoregi hevði nærum alt sítt lív funnið leið í ísinum norðanfyri og hann hevði føling við ísinum. Tað var hann einsamallur, sum tók avgerð um hvar teir skuldu leggja á.

Tað gekk bara sum smurt „Fram“ legði á ísin tann 3. januar 1911 á 175 stigum eystaru longd og stevndi út í tað opna Ross havið tríggjar dagar og 14 tímar seinni. Hetta var næstan met.

Dieselmotorurin hevði staðið sína roynd, hetta var fyrstu ferð at nakar hevði roynt at sigla gjøgnum ís við diesel. Meðan teir sigldu gjøgnum rekaísin høvdu teir skotið eina rúgvu av kópi. Hetta var gott fyri hundarnar, sum seinastu fýra mánaðarnar høvdu livað av turrum fiski og salttálg og teir vóru heldur linir

Teir sigldu móti landi og 11. januar fingu teir tjúkka ísmúrin, sum liggur yvir Rossvíkini í eygsjón. Amundsen skrivar:

„Her lá so ísumúrurin, hann er 200 føtur høgur og eg haldi heldur vit skulu kalla hann ein kavamúr. Eg hevði roknað við, at hann fór at gera meg meira bilsnan, men Shaclketon hevði skrivað so nágreiniliga um hann, at hann var vorðin ein gamal kenningur á ferðini suðureftir. Her eru vit so.“

Nú galt um at finna Hvalvíkina. Ongin umborð hevði verið her fytt. Teir høvdu bara bókina hjá Shackleton at halda seg til. Teir siglu fram við ísinum, eystureftir og komu ov langt. Síðan hildu teir leiðina vestureftir og funnu víkina. Teir vágaðu tað Shackleton ikki tordi, teir sigldu inn í vikina.

„Fram“ sigldi fram við einum ísveggi, ið glitraði í sólini, íspettir skavaðu fram við síðuni, blástur sást og kjógvarnir kavaðu.. Menninir stóðu við bakborðslúnning og hugdi inn í lovaða landið. „Fram“ kendi seg heima í ísinum, augustarnir svumu fram við kantinum og koparnir sólaðu sær á ísinum. „Fram“ legði at innast í víkini, har ísurin var fastur. Ísankørini vóru drigin inn á ísin og Amundsen, Nilsen, Presterud og Stubberud stóðu longu klárin við skíðunum. Teir skuldu gera fyrstu kanningarferðina og finna fram til, hvar teir skuldu seta smáttuna.

Í dag vita vit, at ein oyggj inni í ísinum ger Hvalvíkina. Á veg til havs verður ísurin steðgaður av hesi oyggj. Oyggin er so lá, at hon sæst ikki, hon liggur undir ísinum. Frá hesi oyggj og út til Hvalvíkina, liggur ísurin brotin og ikki javnur, sum í einum vanligum jøkli.

Amundsen og hansara menn vóru eitt sindur óstúttir á beinunum eftir so nógvar mánaðar umborð, men teir komu skjótt á lagið. Teir fóru eftir havísinum og einar tveir kilometrar frá skipinum gekk ísurin í eini brekku niðan móti ísmúrinum. Teir høvdu funnið eina leið frá havísinum og til fastari lendi. Her á leið skuldi smáttan setast upp.

Ísurin var óregluligur og Amundsen var sannførdur um, at her hendu sjálvdan broytingar í ísinum. At ísurin var óregluligur sannførdi hann um, at okkurt steðgaði ísinum og hann var ikki í iva um, at tað var land, sum var atvoldin.. Tá teir vóru komnir aftur á skipið máldu teir dýpið, har har vóru 350 metrar undir teimum.

Amundsen skrivar: „Vit funnu eina lítlan dal einar fýra kilometrar frá skipinum. Her ætla við at seta smáttuna upp. Her fara vit at byggja okkara heim og higani skal okkara arbeiði gerast.Vit byrja longu í morgin hóast tað er sunnudagur við onkrum smávegis og mánadagin fara vit av álvara til verka.“

Tað var ikki nøkur vanlig ferð „Fram“ hevði lagt aftur um. Frá Madeira og til Hvalvíkina vóru ikki færri enn 29.000 kilometur og ferðin varð sigld uttan at hava verið inni nakrastaðni. Hetta ein ein tann longsta sjóferðin í pólsøguni. Tað er ikki løgið, at Amundsen er í góðum hýri og ynskir sær sjálvum tillukku. Hann skrivar soleiðis:

„Her er nógvur kópur á ísinum, nógv meira enn vit hava brúk fyri. Alt tykist at vera lagt til rættis fyri okkum. Má tann Gud, sum eg havi lært at elska, lata hetta halda fram.“

Næstu dagarnir gingu við at fáa alla útgerðina av skipinum og teir fýra kilometrarnar fram til smáttuna, sum teir góvu navnið „Framheim“. Teir lærdu seg at stýra hundunum og veiddu kóp. Veturin lá fyri framman á Suðurpólinum og meðan hann herjaði skuldu teir gera seinastu fyrireikingarnar.



Kokkurin Linfstrøm høgru megin útstappað-i hendan albatrossin